Kappingareftirlitið

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 4
Postboks 6
FO-110 Tórshavn

Att: Niels Winther Poulsen, adv.

Tórshavn, tann 10. mai 2022

# Mál nr: 22/00150: P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð yvirtekur P/F Vágs Timburhandil

## 1. Samandráttur

1. Kappingareftirlitið fekk tann 22. mars 2022 fráboðan um, at P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð hevði í umbúna at yvirtaka P/F Vágs Timburhandil. Fráboðanin var fullfíggjað tann 31. mars. 2022.

2. Yvirtøkan er fevnd av fráboðanarskylduni í §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí talan er um yvirtøku sambært §13, stk. 1, pkt. 2 í kappingarlógini, og tí umsetningsmørkini í §14, stk. 1, pkt. 1 eru nádd.

3. Bæði P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð og P/F Vágs Timburhandil reka virksemi sum timburhandlar, umframt sølu av øðrum byggitilfari, køkum og amboðum.

4. Kappingareftirlitið metir, at tríggir viðkomandi vørumarknaðir kunnu skilmarkast í mun til yvirtøkuna. Hesir eru marknaðurin fyri sølu av byggitilfari, marknaðurin fyri sølu av amboðum og marknaðurin fyri sølu av køkum. Kappingareftirlitið metir harnæst, at talan er um tveir ymiskar landafrøðiligar marknaðir, nevniliga: Suðuroyggin og har landfast er við miðstaðarøkið.

5. Kappingareftirlitið metir ikki, at ætlaða yvirtøkan hevur økta miðsavning við sær, tí luttakandi fyritøkur virka á hvør sínum landafrøðiliga marknaði. Harnæst verður talið á fyritøkum á báðum landafrøðiligu marknaðum hitt sama eftir yvirtøkuna.

6. Kappingareftirlitið metir, at yvirtøkan hjá P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð av P/F Vágs Timburhandil ikki munandi forðar fyri virknari kapping á viðkomandi marknaði.

7. Sambært § 15, stk. 2, 1. lið skal ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, góðkennast.

### 1.1. Avgerð

8. Kappingareftirlitið hevur við heimild í §15, stk. 5 í kappingarlógini tikið avgerð um, at góðkenna yvirtøkuna hjá P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð av P/F Vágs Timburhandil, vísandi til §15, stk. 2, 1. lið í kappingarlógini. Sambært ásetingin skal ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, góðkennast.

## 2. Málslýsing

### 2.1. Inngangur

9. Kappingareftirlitið fekk tann 22. mars 2022 fráboðan um, at P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð hevði í umbúna at yvirtaka P/F Vágs Timburhandil. Kappingareftirlitið fekk fullfíggjaða fráboðan tann 31. mars 2022.

10. Fráboðanarskyldan í §16, stk. 1 í kappingarlógini fevnir um tær samanleggingar, yvirtøkur og samváðar, sum eru fevndir av §13, stk. 1, pkt. 1 ella 2, og har umsetningsmørkini í §14, stk. 1, pkt. 1 ella pkt. 2 eru nádd.

11. Talan er um yvirtøku sambært §13, stk. 1, pkt. 2 í kappingarlógini, tá ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræðið á minst einari fyritøku, ella tá ein ella fleiri fyritøkur við keyp av pørtum ella ognum, gjøgnum avtalu ella á annan hátt, fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræðið á allari ella pørtum av einari ella fleiri fyritøkum afturat.

12. Sambært § 14, stk. 1, nr. 1-2, eru umsetningsmørkini nádd, um luttakandi fyritøkurnar tilsamans hava ein árligan umsetning upp á í minsta lagi 75. mió. kr. í Føroyum, og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein samlaðan árligan umsetning uppá 15. mió. kr. í Føroyum, ella minst ein av luttakandi fyritøkunum hevur ein árligan umsetning í Føroyum uppá 75 mió. kr., og minst ein av hinum fyritøkunum hevur ein umsetning uppá 75. mió. kr. á heimstigi.

13. Umsetningurin hjá luttakandi feløgunum í 2021 var:

| Luttakandi fyritøkur | §14, stk. 1, pkt. nr. 1 | §14, stk. 1, nr. 1 |
|---|---|---|
| P/F Bygma Balslev | [...] | |
| P/F Vágs Timburhandil | [...] | |

14. Sum tað framgongur omanfyri, so hava minst tvær av luttakandi fyritøkunum ein umsetning, sum er omanfyri 15 mió. kr., og luttakandi fyritøkurnar hava ein samlaðan umsetning, sum er omanfyri 75 mió. kr.

15. Talan er sostatt um yvirtøku, sum er fevnd av fráboðanarskylduni í §16, stk. 1 í kappingarlógini.

16. Luttakandi fyritøkur reka í høvuðsheitum virksemi sum timburhandlar umframt sølu av øðrum byggitilfari, amboðum og køkum.

### 2.3. Transaktiónin

17. Yvirtøkan verður framd við, at P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð keypir øll aktivini út úr felagnum P/F Vágs Timburhandil fyri [...] mió. kr.

18. Sambært fráboðara fer virksemi í Vági at verða rikið óbroytt víðari við somu leiðslu og starvsfólkum og mett verður tískil ikki, at transaktiónin fær ávirkan á virksemið.

19. Tað er danska fyritøkan Bygma Gruppen A/S, sum eigur allan partapeningin í P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð. Peter Hellerung Christiansen og Bygma Fonden eiga meirilutan av Bygma Gruppen A/S.

20. Sp/f VT-Holding eigur allan partapeningin í P/F Vágs Timburhandil. Heigi Brynjolfsson eigur allan smápartapeningin í Sp/f VT-Holding.

21. Í keypsavtaluni verður seljari álagdur ein kappingarklausul. Kappingareftirlitið metir, at kappingarklausulurin er innanfyri siðvenjuna hjá Kappingarráðnum á økinum

### 2.4. Viðkomandi marknaður

22. Tá metast skal um, hvørt ein yvirtøka kann avmarka kappingina á marknaðinum, er neyðugt, at skilmarka tann marknað, sum yvirtøkan fær ella kann fáa ávirkan á. Skilmarkingin av

viðkomandi marknaði fevnir bæði um viðkomandi vørumarknað og viðkomandi landafrøðiliga marknað.

23. Í § 5 í kappingarlógini er ásett, at eftirspurningsvaraseting, útboðsvaraseting og møgulig kapping skal kannast í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði.

24. Luttakandi fyritøkur hava virksemi á fleiri marknaðum, men har, sum virksemi serliga umskarast, er á vørumarknaðinum fyri sølu av byggitilfari, amboðum og køkum. Hesir eru teir marknaðir, sum kunnu verða ávirkaðir av yvirtøkuni.

25. Kappingareftirlitið metir, at tríggir viðkomandi vørumarknaðir kunnu skilmarkast í mun til yvirtøkuna. Talan er um vørumarknaðin fyri sølu av byggitilfari, vørumarknaðin fyri sølu av amboðum og vørumarknaðin fyri sølu av køkum.

26. Marknaðurin fyri sølu av byggitilfari er nakað eintáttaður á veitarasíðuni í Føroyum. Tað eru serliga timburhandlarnir, sum selja byggitilfari, men privatpersónar og byggivinnan innflytur eisini nakað av tilfar til egna nýtslu. Talan er í høvuðsheitum um homogenar vørur. Í kanning, sum Kappingareftirlitið gjørdi av viðkomandi marknaði í 2019 vísti, at egin innflutningurin hjá privatperónum og byggivinnuni var áleið 22%.[1] Timburhandlarnir í Føroyum eru tískil undir ávísum kappingarligum trýst frá útlendskum veitarum.

27. Byrjunarkostnaðurin at byrja virksemi á hesum marknaði er lutfalsliga høgur. Tað verður í flestu førum væntað av kundunum, at veitarin hevur goymslur og kann veita beinanvegin ella við stuttum skotbrái. Hetta krevur íløgur í bygningar, goymslur og hevur munandi kapitalkostnað við sær. Fráboðari metir, at íløgan fyri at seta á stovn ein timburhandil í Føroyum er millum 15 og 20 mió. kr., íroknað tøkan pening til rakstur.

28. Keyparin av byggitilfari er í stóran mun byggifyritøkurnar í Føroyum og privatpersónar.

29. Marknaðurin fyri amboðum er sera fjølbroyttur á veitarasíðuni. Umframt timburhandlar og byggibúðir, so eru veitarar innan aðrar vinnugreinar, sum burturav selja amboð. T.d. vøruhandlar, maskinhandlar og líknandi. Eisini er møguligt at keypa amboð umvegis alnótina. Sambært fráboðara eru nýggjar fyritøkur komnar inn á marknaðin seinastu 5 árini.

30. Mett verður at byrjunarkostnaðurin at byrja virksemi á marknaðinum fyri amboðum er lágur. Tað er ikki neyðugt við stórum íløgum í handilsstað ella stórum goymslum. Eisini er møguleiki at selja amboð umvegis alnótina.

31. Keyparin av amboðum er í stóran mun byggifyritøkurnar í Føroyum og privatpersónar.

32. Marknaðurin fyri sølu av køkum er sera fjølbroyttur á veitarasíðuni. Umframt flestu timburhandlar, so eru aðrar fyritøkur sum selja køkar. Kapping er eisini frá útlendskum veitarum, sum hava føroysk søluumboð, umframt at flutningsveitarar bjóða seg fram at flyta køkar til Føroyar.

33. Mett verður at byrjunarkostnaðurin at byrja virksemi á marknaðinum fyri sølu av køkum kann vera nakað høgur, um ætlanin er, at byrja virksemi við stórum handilshølum og breiðum vøruúrvali. Í hesum sambandi er neyðugt við íløgum í handilsstað og goymslu. Um talan bert er um umboðan og avmarkað vøruúrval í handilshølum ella gjøgnum alnótarsølu er byrjunarkostnaðurin væl lægri.

34. Keyparin av køkum er m.a. privatpersónar og byggifyritøkur.

35. Í mun til skilmarking av viðkomandi landafrøðiliga marknaði metir fráboðari sannlíkt, at luttakandi fyritøkur virka á hvør sínum landafrøðiliga marknað. Fráboðari metir, at Suðuroyggin er ein landafrøðiligur marknaður fyri seg, meðan hin landafrøðiligi marknaðurin er, har landfast er við miðstaðarøkið. Innlit, sum fráboðari hevur latið Kappingareftirlitinum í

[1] Mál nr. 18/00374, s. 4

mun til sølu hjá luttakandi fyritøkum, gevur eisini Kappingareftirlitinum fatan av, at talan er um hvør sín landafrøðiliga marknað. Kappingareftirlitið kom eisini fram til somu skilmarking av viðkomandi landafrøðiliga marknaði í viðgerð av samanleggingini millum P/F Borg og P/F Havnar Timburhandil.[2]

36. Kappingareftirlitið metir tí sannlíkt, at viðkomandi landafrøðiligi marknaður í øllum førum í mun til sølu av byggitilfari kann skilmarkast í tvey nevniliga: Suðuroyggin og har landfast er við miðstaðarøkið.

## 3. Meting

37. Í § 15, stk. 2 í kappingarlógini er ásett metingarstøði, sum skal brúkast í sambandi við viðgerð av eini yvirtøku. Sambært ásetingini skal ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, góðkennast. Hinvegin skal ein samanlegging, sum munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, forbjóðast.

38. Í sambandi við meting av kappingarligu avleiðingunum av yvirtøkuni hjá P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð av P/F Vágs Timburhandil hevur Kappingareftirlitið innheitað tøl frá Taks yvir nettosøluna hjá øllum timburhandlum í 2021. Tølini geva ábending um støðd á marknaðarpørtum hjá timburhandlunum í Føroyum.

39. Leggjast skal til merkis, at tølini ikki taka hædd fyri tí innflutningi, sum privat ella vinnurekandi innflyta sjálvi. Í kanning, sum Kappingareftirlitið gjørdi í sambandi við yvirtøkuna hjá P/F Borg av P/F Havnar Timburhandil varð staðfest, at egin innflutningurin í mun til sølu av timbri var áleið 22 %. Kappingareftirlitið hevur í sambandi við viðgerð av hesi samanlegging ikki dagført hesi tøl, men metir sannlíkt, at egin innflutningurin er áleið hin sami í dag.

| Marknaðarpartur í mun til nettosølu | 2021 |
|---|---|
| R.B. Thomsen & Søn | [0-5]% |
| Valdemar Lützen | [0-5]% |
| Vágs Timburhandil | [0-5]% |
| Bygma Balslev Timburhandil & Byggibúð | [30-40]% |
| Sandavágs Timburhandil | [10-20]% |
| Handilsvirkið Niclasen | [0-5]% |
| Borg | [30-40]% |

40. Tað er 7 fyritøkur í Føroyum, sum dríva virksemi sum timburhandlar. 5 av hesum fyritøkum er staðsettar í miðstaðarøkinum, meðan 2 eru staðsettar í Suðuroynni. Um hugt verður at føroyska marknaðinum sum ein landafrøðiligur marknaður sæst, at marknaðarparturin hjá P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð er millum [30-40]% áðrenn yvirtøkuna, meðan marknaðarparturin hjá P/F Vágs Timburhandli er millum [0-5]%. Verður føroyski marknaðurin mett sum ein landafrøðiligur marknaður, verður marknaðarparturin hjá Bygma Balslev eftir yvirtøkuna millum [40-50] %.

41. Í mun til skilmarking av viðkomandi landafrøðiliga marknaði í pkt. 2.4, metir Kappingareftirlitið, at marknaðurin í øllum førum í mun til sølu av byggitilfari kann skilmarkast í tveir landafrøðiligar marknaðir, nevniliga Suðuroyggin og har landfast er við miðstaðarøki. Søla av byggitilfari er høvuðsvirksemið hjá hesum fyritøkum.

42. Sambært upplýsingum, sum fráboðari hevur latið Kappingareftirlitinum í málinum, so er greið ábendingum um, at sølan av amboðum og køkum í øllum førum hjá luttakandi fyritøkum er sera avmarkað millum landafrøðiligu marknaðirnar. Kappingareftirlitið metir tí sannlíkt - um

[2] Mál 18/00374, s. 2

enn í minni mun enn fyri byggitilfarið - at eisini fyri hesar marknaðir kann skilmarkast millum tveir landafrøðiligar marknaðir.

43. Í mun til samlaðu nettosøluna fyri 2021, var marknaðarparturin í Suðuroynni hjá Vágs Timburhandli millum [60-70]%, meðan marknaðarparturin hjá Richard B. Thomsen & Søn & Suðuroyar Timburhandil var millum [30-40]%.

44. Í mun til samlaðu nettosøluna fyri 2021 var býtið á marknaðarpørtunum, har landfast er við miðstaðarøki býtt soleiðis, at Bygma Balslev hevði millum [30-40]%, Borg hevði [30-40]%, Valdemar Lutzen hevði [0-5]%, Sandavágs Timburhandil hevði [10-20]%, meðan Handilsvirkið Niclasen hevði ein marknaðarpart, sum lá millum [0-5]%.

45. Havast skal í huga, at omanfyrinevnda býti av marknaðarpørtum ikki tekur hædd fyri tí egininnflutningi, sum er á marknaðinum. Veruligu marknaðarpartarnir hjá timburhandlunum eru tí nakað lægri, enn tølini í talvuni geva ábending um.

46. Sambært vegleiðing frá ES-Nevndini um horisontalar yvirtøkur[3], so er ein marknaðarpartur á 25% í sær sjálvum ein ábending um, at virkna kappingin ikki verður avmarkað av yvirtøkuni. Í somu vegleiðing verður sagt, at marknaðarpartur, sum liggur omanfyri 50% er ein ábending um, at eina marknaðarráðandi støða verður skapt. Lagt verður afturat um marknaðarpartar, at smærri partar - millum 40-50% og enntá minni enn 40% - kunnu saman við øðrum viðurskiftum geva ábending um, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt. Hetta síðsta merkir, at marknaðarpartar minni enn 50% kunnu ikki í sær sjálvum vera ein ábending um, at ein marknaðarráðandi støðu verður skapt.

47. Kappingareftirlitið metir ikki, at yvirtøkan hjá P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð Bygma Balslev av P/F Vágs Timburhandli hevur við sær økta miðsavning á viðkomandi marknaðum. Hetta kemst serliga av, at luttakandi fyritøkur hava virksemi á hvør sínum landafrøðiliga marknaði.

48. Havast skal eisini í huga, at talið av fyritøkum á báðum landafrøðiligum marknaðum verður hitt sama eftir ætlaðu yvirtøkuna. Fráboðari hevur upplýst fyri Kappingareftirlitinum, at virksemið hjá Vágs Timburhandli fer at verða rikið óbroytt víðari við somu leiðslu og starvsfólkum. Fráboðari metir tó, at veitingartrygdin hjá Vágs Timburhandli verður nakað størri eftir yvirtøkuna, tí innkeypið hjá luttakandi fyritøkum verður samskipað umframt at vøruútboðið verður størri.

49. Kappingareftirlitið metir harnæst, at talan um ein marknað, har vørurnar í stóran mun er homogenar – serliga tá talan er um sølu av byggitilfarið og amboðum. Talan er um ein marknað við fullari substitutión. Brúkarin kann tí lættliga keypa, men eisini samanbera prísirnar hjá einstøku timburhandlunum í Føroyum við prísir uttanlands.

50. Í mun til teir viðkomandi vørumarknaðir, sum vórðu skilmarkaðir í pkt. 2.4. er talan um marknaðir, har lutfalsliga fleiri fyritøkur er virknir á føroyska marknaðinum. Harnæst er kapping eisini frá útlendskum veitarum. Í kanning, sum Kappingareftirlitið gjørdi í sambandi við yvirtøkuna hjá P/F Borg av P/f Havnar Timburhandli varð t.d. staðfest, at egin innflutningur av byggitilfarið uttan um føroysku timburhandlarnar var áleið 22%. Kappingareftirlitið er av teirri fatan, at talan er um ein marknað við virknari kapping, og har brúkarin eisini kann keypa somu ella líknandi vøru uttanlands.

51. Harnæst eru lítlar atgongdarforðingar at byrja virksemi fyri stóran part av viðkomandi marknaði. Sjálvsagt er neyðugt við størri íløgum í goymslubygning um ætlanin er byrja virksemi

[3] (2004/C31/03) - Guidelines on the assessment of horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentration between undertakings.

at selja byggitilfar, meðan søla av amboðum og køkum ikki neyðturviliga krevur eina eins stóra íløgu í t.d. handilshøli.

52 Kappingareftirlitinum kunnugt eru heldur ongar lógartekniskar forðingar hjá nýggjum aktørum at byrja virksemi á viðkomandi marknaði.

53 Í sambandi við almannakunngerð av ætlaðu yvirtøkuni, heitti Kappingareftirlitið á almenningin og kappingarneytar hjá luttakandi fyritøkum um koma við møguligum viðmerkingum til, hvørt ætlaða yvirtøkan kann hava skaðilig árin á kappingina. Viðmerkingarnar, sum Kappingareftirlitið fekk geva ábending um, at virkna kappingin ikki verður ávirkað av ætlaðu yvirtøkuni.

54. Kappingareftirlitið metir tí samanumtikið, at yvirtøkan hjá P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð av P/f Vágs Timburhandil ikki munandi forðar fyri virknari kapping á viðkomandi marknaði.

55. Sambært § 15, stk. 5, skal ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu góðkennast.

## 4. Niðurstøða

56. Kappingareftirlitið hevur tí við heimild í §15, stk. 5 í kappingarlógini tikið avgerð um, at góðkenna yvirtøkuna hjá P/F Bygma Balslev Timburhandil og Byggibúð av P/F Vágs Timburhandil., vísandi til §15, stk. 2, 1. lið í kappingarlógini. Sambært ásetingin skal ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, góðkennast.

Vegna

Kappingareftirlitið

Sigurd Rasmussen
fulltrúi

Rúni J. Niclassen
fulltrúi